FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-116-1.2
dags. 26-10-2010

Umhvørvisstovan
Att: Jóhanna Olsen, deildarleiðari

us us.fo

Viðv.: Tygara mál nr. 09/00048-21 um uppskot til kunngerð um ozonoyðandi evni

Føroya Kommunufelag hevur móttikið uppskotið 13-10-2010 og er hettar viðgjørt á stýrisfundi 19-10-2010. Felagið hevur harafturat valt, at senda Agenda 21 stovuni uppskotið til ummælis.

Viðmerkingarnar er hesar:

Kunngerðin er uppskot um vernd av ozonlagnum og hevur sum endamál, at øll nýtsla og útlát av ozonoyðandi evnum verður forboðin.

Kunngerðin er galdandi fyri øll ozonoyðandi evni herundir eisini blandingar har ozonoyðandi evni eru partar og í mesta lagi 1% av innihaldinum, og fevnir um allar tilgongdir líka frá framleiðslu, inn- og útflutning, marknaðarføring, nýtslu, burturbeining, og endurnýtslu ella endurvinning.

Kunngerðin hevur sambært altjóða sáttmálum, ið Føroyar hava tikið undir við, støðið í Montreal protokollini og MARPOL sáttmálanum anneks VI, regla 12.
Víðari er kunngerðin heimilað sambært løgtingslóg nr.134 frá 29.10.1988 um umhvørvisvernd, og sambært løgtingslóg nr. 59 frá 17.05.2005 um verju av havumhvørvinum.

Høvuðsreglan í kunngerðini er eitt generelt forboð, men eins og í norðurlondum, ES og aðrastani, eru undantøk gjørd har millum annað er loyvt at innflyta og marknaðarføra og nýta óbrúkt HCFC-22 (R-22) fram til 1.januar 2011 og endurvirkaðum HCFC-22 fram til 31.desember 2014.

Serstakt undantak uttan freist verður givið eldsløkkiskipanum og eldsløkkjarum og øðrum vørum og útbúnaði til neyðsynjarnýtslu og har evnið Halón verður nýtt. Evnini eru trý og nevnd í fylgiskjali 1 bólkur III. Serstaka stóra ávirkan á ozonlagið hevur Halón-1301 og Halón-2402.

Viðmerkjast kann her, at Danmark er einasta land í heiminum, sum setur serstøk krøv til handils- og fiskiflotan í samband við útfasan og forboð móti nýtslu av Halón-1301 og Halón-2011 til brandsløkking. Hesi evni eru nú forboðin í Danmark javnbjóðis CFC o.ø. evnum.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Danska umhvørvismálaráðið nevnir í frágreiðing frá 2002 (publikation 2002/87-7972-053-6) at onnur evni vísa seg at hóska væl til brandsløkking m.a. Inergen, ið stendur í evnunum Argon, Køvievni og nakað av Koltvíiltu. Somuleiðis kann ein blanding nevnd Argonite, ið er Argon og Nitrogen, nýtast til brandsløkking.

Sambært ES kunngerð nr. 744/2010 um evni, ið oyða ozonlagið, her umrøddu Halónir, verður m.a. nevnt at hesi evni ikki eru avgjørd krøv til brandsløkking við heilt einstøkum undantøkum m.a til flogfør. Í fylgiskjalinum til ES-kunngerðina er ásett at nýggjar Halón-installatiónir ikki kunnu setast upp eftir 31.desember 2010, meðan flogførð hava eina freist til 2014 og 2018, og í tíðarskeiðnum 2025 og 2040 er bannað at nýta Hálón til brandsløkking.

Mett verður at umstøður kring neyðsynjarnýtslu, um hugt verður eftir ásetingunum hjá ES, eiga at takast til eftirtektar og møguliga eisini herðast í mun til at uppskotið til kunngerð Undantøk § 5. d, har nevnt er, at innflutningur av halónum skal verða loyvdur. ES kunngerðin mælir til at Halónir ikki verða loyvdar frá 2013 har til ber at seta í staðin aðrar loysnir, tó alt eftir hvussu stór tøknilig og fíggjarlig krøv roknast kann við.

Undir grein 2, stk. 3 innan Virkisøki verður mett at orðið *goymsla* eigur at takast við soleiðis at eftirlitsmyndugleikin hevur fulla trygd at allir virkismøguleikar eru fult greiðir. Somuleiðis eigur orðið *goymsla* at takast við í grein 13 stk. 3 har orðingin t.d. kann vera: *skulu skráseta innflutning, útflutning, goymslu og sølu.* Sama í grein 14 stk.3.: *ella tey, ið brúka og/ella hava ozonoyðandi evni á goymslu.*

Í grein 4 stk. 2 undir Forboð er nevnt, at tað ikki er loyvt at hava ozonoyandi evni á transit-goymslu. Við inn- ella útflutning sleppst ikki undan at ozon-oyðandi evni liggja á goymslu inntil móttakari hevur heintað vøruna, ella at avskipan verður framd. Dømi er um dynamit, ið lá á goymslu (eisini skilt sum konteynari inni á girdum havnarøki) í mánaðir á havnarøki. Her kann ivamál stinga seg upp um nær goymslan skal skiljast sum transit-goymsla.

fyri felagið

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

fyri Agenda 21 stovuna

Kári Thomsen, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo